# Heldur fyribyrging enn eftirviðgerð

**Tað er bæði rættari og bíligari at fyribyrgja vanlukkum og arbeiðsskaðum enn at viðgera, tá skaðin er hendur, sigur Soffi Egholm, valevni Javnaðarfloksins í Norðurstreymoy**

LØGTINGSVAL
*Edvard Joensen*



*Tað er bæði bíligari og gevur betri lívskvalitet at fyribyrgja sjúku og skaða heldur enn at viðgera, tá skaðin er hendur, vísir Soffi Egholm á. Hon er uppstillað til løgtingsvalið fyri Javnaðarflokkin í Noðrurstreymoy*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Leynum:** Tað er alt ov lítið gjørt við arbeiðsmedisin í Føroyum, heldur Soffi Egholm, sum er stillað upp til løgtingsvalið fyri Javnaðarflokkin í Norðurstreymoy. Hennara hjartamál eru almanna- og heilsumál, og serliga er tað trivnaðurin á arbeiðsmarknaðinum, sum liggur henni á sinni.

Vit sita í stovuni í Leynum. Útsýni oman á Lónna er frálíkt. Uttan fyri skínur sólin. Men lotið er kortini so mikið kølið, at Soffi hevur valt at lata altanhurðina vera afturlatna.

Kortini hoyrist spakuliga sjóðið av runinum á Lónni. Áarsuðið blandar seg upp í ljóðini uttanfyri, og einar tvær ær hava rímiliga góðan hug á úthurðini.

– Eg lat hurðina standa opna i morgun, og beinanveg vóru tær inni, greiðir Soffi frá.

Soffi Egholm, sum er ættað úr Leynum, hevur búð í Danmark i 28 ár og er nýliga flutt heimaftur til Føroya.

– Hon hevur luttikið aktivt í donskum politikki. Bæði sum amtsráðslimur í Viborg Amt, har hon búði, og eisini sum landspolitikari. Hon var uppstillað fyri Javnaðarflokkin í Ringkøbing Amt. Har er hon tvær ferðir vorðin tiltakslimur til Fólkatingið, og hevur eisini sitið á Fólkatingi sum slíkur.

– Tað er krevjandi at vera tiltakslimur, greiðir hon frá, tí væntað verður av tær, at tú ert inni í tingunum, sum viðgjørd verða á Fólkatingi, tá tú verður innkallað. Tað verður rættiliga nógv pappír býtt út, eisini til tiltakslimirnar, um mál, sum teir skulu seta seg inn í.

### Eingin ivi

Hóast hon mestsum við sær sjálvari hevði gjørt av at gevast við aktivum politikki, tá hon flutti aftur til Føroya, játtaði hon kortini at stilla upp til løgtingsvalið, nú heitt varð á hana. Og tað var eingin ivi um, at tað skuldi vera fyri Javnaðarflokkin.

– Tað liggur í blóðinum, sigur hon. Og eg vil siga beinanveg, at mær hevði dámt væl, um sambandið millum Javnaðarflokkin og fakfeløgini varð styrkt. Tí tað er i fakfeløgunum, at vanliga arbeiðsfólkið er.

Í sínum dagliga yrki í Danmark kom Soffi rættiliga nógv í samband við fólk, sum veruliga høvdu brúk fyri almannaverkinum. Hon er útbúgvin psykoterapeutur og hevur verið rættiliga virkin innan økissálarrøktina.

Hon sigur, at í Føroyum eru vit óhugnaliga langt aftan fyri tað, sum vit áttu at verið nádd til á tí økinum.

Grundirnar kunnu vera so ymiskar, men eingin ivi er í hennara sál um, at tann politiski áhugin og viljin hevur ikki økt møguleikarnar hjá hesum partinum av almanna- og heilsuverkinum.

### Arbeiðsmarknaðurin

Soffi Egholm er sannførd um, at í Føroyum nógv eftir at gera, áðrenn almannaverkið er komið á hædd við tað, sum er í Danmark.

Tað verður ofta havt upp í móti teimum, sum tosa um betri almannaverk, at tað kostar so nógv, vísir Soffi Egholm á.

Aftur í móti tí plagar hon at siga, at tað er nogv bíligari at fyribyrgja skaða og sjúku heldur enn at eftirviðgera, tá skaðin er hendur.

Serliga tað við fyribyrging er eitt øki, har føroyingar eru rættiligir eftirbátar, visir hon á.

– Arbeiðsmedisin er eitt forsømt fyribrigdi í Føroyum, og Arbeiðseftirlitið tykist bara koma, tá boð verða send eftir tí, sigur valevnið í Norðurstreymi.

Tað skal eftir hennar metan vera øvugt. At farið verður út á arbeiðsplássini og ansað verður eftir, at tær neyðugu fyriskriftirnar verða hildnar.

Men eitt annað er, sum eisini átti at verið nógv meira gjørt við, vísir hon á. Tað er, at kommunulæknarnir áttu at fingið nógv betri umstøður til gransking.

Vanliga er kommunulæknin tann fyrsti, sum sær einhvønn skaða ella hóttafall, sum fólk hava.

Hann átti so at havt møguleika fyri at fylgt hesum og á tann hátt kanska funnið fram til, hvør grundin var, og hvussu tað kann fyribyrgjast eina aðraferð.

### Sjálvbjargin

Eingin ivi er um, at vit skulu vera sjálvbjargin her í landinum, sigur Soffi Egholm.

– Men at vera sjálvbjargin nýtist ikki at merkja tað sama sum, at nú kvetta vit bara alt samband við Danmark.

Tað eigur at koma so við og við, sum umstøðurnar loyva tí.

Hon sigur, at hon er púra sannførd um, at vit hava rætt til hasa milliardina, sum nógv fólk hava so ilt av, at vit fáa. Og av tí sama metir hon, at tað er skeivt at skera hana burtur.

Føroyskur politikkur, og harvið valstríð, snýr seg í ov stóran mun um fullveldi ella ikki, meðan vanligt fólk, sum veruliga hevur brúk fyri rættiligum politiskum avgerðum, detta niður ímillum.

Tosað verður altíð um útbyggingar og vinnu, sum gevur nógvar pengar, so fólk kunnu brúka uppaftur meira.

– Tá er tað líkasum legalt at koma við dýrum vallyftum, vísir Soffi Egholm á. Men tann, sum váðar sær at lova fólki betri liviumstøður annars, verður lagdur undir at oyða landsins pengar.

Men júst tann boðskapur, hon vil hava út um, at fyribyrging er betri enn eftirviðgerð, vísir, at tað verður bíligari at reka almannaverkið soleiðis.

Og so verður lívskvalitet-urin hjá fólki eisini nógv hægri av tí sama,vísir Soffi Egholm, løgtingsvalevni hjá Javnaðarflokkinum í Norðurstreymoy, á.

## Av skítinum til

Hava tit hoyrt
um ein hundalort
í Kirkjubø mundi liggja ?
Jú vit hava frætt
at ein kona datt
sum mundi ei fyri seg hyggja

So víst er tað svárt
at stíga í lort
og nógv fyri slíkt skula gjalda
men hóast hon datt
tað er púra rætt
at gera sum dómarar halda

So ganga tað má
tá ikki ein frá
tí váta slagnum seg heldur
so lort tað jú gekk
og rokning hon fekk
tí landsrættardómur er feldur

**edvard**

# Lembir í Leynum

**Hóast kanska í fyrra lagi hjá bøseyðinum, tykist rættiliga farið at lemba í Leynum. Hendan dagin, myndamaðurin kom framvið, vóru tvey lomb at síggja, og síðan er okkurt komið afturat**

LEMBING
*Edvard Joensen*

**Leynar:** Tvey lomb vóru at síggja í bønum í Leynum hósdagin, og fríggjamorgunin, tá blaðmaðurin koyrdi framvið, var enn eitt komið.

Tað plagdi ikki at vera serliga væl dámt, tá tað lembdi ov tíðliga. Í fyrsta lagi um mánaðarskiftið komandi plagdu gomlu røktingarmeninir at halda, lembingartíð var.



*Fyrsta lambið var svart, og tað mettu teir gomlu ikki at vera gott tekin*

*Mynd: Edvard Joensen*

Seinnu árini eru teir farnir at sleppa brundunum út upp aftur seinni, enn gjørt varð fyrr. Tí royndir vísa, at tann eina vikan um várið, týðir einki aftur í móti tí, seyðurin fær um heystið.

Viðhvørt hendir so tað, at okkurt veður lamb er, sum ger seg sjálvt upp, og tá soleiðis er, er ringt at stýra náttúruni. Tí hvør vil hava sítt, og einki er at siga til, at tann, sum heldur seg til sum tann fyrsti, fær sín fulla part.

Kann vera, at einhvør av hesum slagnum, sum hevur gingið uttanum, hevur verið upp á spæl í Leynum í heyst.

Men illa hevði dámt gomlu monnunum teknini, at fyrsta lambið, teir fingu, skuldi vera svart. Tað merkti ikki gott ár, vildu teir vera við.



Búskapur og vinna:

## Ávarar ímóti Røkke

Norski fiskimálaráðharrin, Svein Ludvigsen, er alt annað enn fegin um, at kendi ríkmaðurin Kjell Inge Røkke ætlar sær at keypa 21,2 prosent í einum trolarafelag í Lofoten. Vestvågøy kommuna eigur partin, men hevur boðið hann til sølu, og Røkke er tann, sum hevur boðið mest.

Fær Kjell Inge Røkke fatur á teimum 21,2 prosentunum í trolarafelagnum í Lofoten, fær hann ræðisrætt yvir 18 prosentum av norsku trolarakvotuni, og tað heldur fiskimálaráðharrin vera óheppið. Svein Ludvigsen sigur tað vera skeivt, at ein einstaklingur skal ráða yvir einum so stórum parti av trolarakvotuni, men fyribils fer hann at bíða eftir einum ummæli frá myndugleikunum á økinum.

## Læna í evrum

Hóast danir søgdu nei til at seta felags evropeiska gjaldoyrað evruna í gildi í Danmark, hava teir einki ímóti at taka lán í evrum. Eitt uppgerð hjá donsku realkreditfeløgunum vísir, at í fjør læntu danir evrulán, sum svara til 45 mia. krónur.

Stjórin í Realkredit Danmark, Sven Holm, heldur tað vera hugvekjandi, at danir siga nei til evruna, men at teir kortini eru til reiðar at nýta hana, tá talan er um at læna pengar. Orsøkin til, at tað er so, er, at tað er bíligari at taka lán í evrum enn krónum.

## Ongan landbúnað!

Í gjár skrivaðu vit í hesum teigi, at norsku bøndurnir vilja hava størri stuðul frá tí almenna. Bóndafelagið sigur, at tey næstu fimm árini fara 12.000 ársverk at hvørva úr landbúnaðinum.

Men nú sigur heimshandilsfelagsskapurin WTO, at norðmenn eiga at gevast við at reka landbúnað og heldur keypa matvørurnar úr útlandinum. WTO sigur, at størri almennur stuðul avlagar kappingina og mælir heldur til, at norsku bøndurnir fáa okkurt annað at gera.

UTTAN ÚR HEIMI

# Framferðin hjá Sharon loysir ongan trupulleika

**Amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, sigur, at ísraelska royndin at útrudda yvirgang er nyttuleys.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Í gjár skuldi Colin Powell hitta mannin, sum hevur lagt átakið ímóti teimum palestinsku yvirgangsmonnunum til rættis, Ariel Sharon, forsætisráðharra.

Áðrenn hann kom til Ísraels hóskvøldið, segði Powell, at sama hvussu leingi ísraelski herurin heldur fram við átakinum á Vestara Áarbakka, verður trupulleikin ikki loystur.

–Tað verða framvegis tey, sum eru til reiðar at nýta harðskap og sjálvmorðsbumbur. Harðskapurin og hatrið hvørvur ikki, fyrr enn vit finna eina politiska loysn, sum ber í sær, at ein palestinskur statur verður skipaður, segði Powell.

Seinastu dagarnar hava bæði hann og George W. Bush, forseti fleiri ferðir kravt, at Ísrael skal taka seg aftur.

Men Sharon hevur sýtt fyri at slaka. So seint sum hósdagin segði hann seg duga at skilja, at amerikanararnir hava ein trupulleika í Miðeystri, men legði afturat, at amerikanararnir eisini mugu duga at skilja tað, sum Ísrael er í ferð við.

Í gjár skuldi Powell hitta Sharon, og í dag skal hann tosa við palestinska leiðaran, Yasser Arafat, sjálvt um Sharon heldur tann fundin vera eitt mistak. Sharon sigur, at Arafat er yvirgangsmaður, men mikudagin segði Powell, at Arafat er tann, sum Ísrael noyðist at samráðast við.

Ísraelski herurin upplýsti í gjár, at hann hevur tikið 4.185 palestinskar fangar á Vestara Áarbakka. Fyrr hevur Ísrael sagt, at fleiri enn 200 palestinar eru deyðir í bardøgum, men palestinar siga, at talið er oman fyri 500.

# Hernaðarkvett í Venesuela



*Ovastin fyri flotanum las yvirlýsingina frá teimum tíggju generalunum, sum kravdu forsetan frá.*

**Kvettið er úrslit av aðalverkfalli og stórum mótmælisgongum ímóti Hugo Chavez, forseta.**

VENESUELA
*Árni Joensen*

Tað hevur verið ógvuliga ófriðarligt í suðuramerikanska landinum Venesuela seinastu dagarnar. Arbeiðsfólk í oljuídnaðinum fóru í verkfall fyri at mótmæla, at Hugo Chavez, forseti hevði fingið sær ov stóra ávirkan á oljuídnaðin, og síðani hava fleiri onnur fakfeløg tikið undir við mótmælinum.

Hóskvøldið legði løgreglan uppí, og níggju fólk lótu lív í samanbrestum millum løgregluna og mótmælisfólkið í høvuðsstaðnum Caracas.

Stutt eftir boðaðu tíggju av landsins ovastu generalum frá, at teir viðurkenna ikki Hogo Chavez sum landsins leiðara longur. Teir tíggju, sum umboðaðu herin, tjóðarhirðina, flotan og flogvápnið, søgdu í einari yvirlýsing, at eingin av teimum vápnaðu deildunum viðurkendu foretan sum ovasta longur.

Í yvirlýsingini løgdu generalarnir forsetan undir at virka ímóti teimum demokratisku skipanunum og at bróta mannarættindini hjá fólkinum í landinum.

Støðan í Venesuela var ógreið í gjár, og sambært altjóða tíðindastovunum var ikki greitt, um forsetin ætlaði at gera eftir áheitanini frá teimum vápnaðu deildunum og at leggja frá sær.

Úr Norðurlondum:

## 94% fullu

Tað hevur vakt ans í norska skúlaverkinum, at bara fýra av 63 lesandi á einum skúla í Gjøvik stóðu matematikroyndina, sum var stutt fyri páskir, og leiðslan á skúlanum er nú farin at kanna, hvat bagdi. Tað ger ikki støðuna betur, at tey fýra, sum megnaðu uppgávuna, fingu ein karakter, sum var beint oman fyri minstamarkið.

Tey lesandi siga, at uppgávan var alt ov torfør, og nú skal skúlaleiðslan so kanna, um tað er tann rætta frágreiðingin.

## Átrúnað fyri kristni

Ein meiriluti í borgaraumboðanini í Keypmannahavn mælti í gjár skúlunum í kommununi til at víðka lærugreinina kristni, so hon eisini kann umfata annan átrúnað. Ein orsøk til tilmælið er, at rættiliga nógv børn av útlendskum uppruna ganga í skúla í Keypmannahavnarøkinum, og at tey flestu teirra hava annan átrúnað enn tann kristna.

Flestu flokkarnir í borgaraumboðanini taka undir við tilmælinum, men Ulla Tørnæs, kenslumálaráðharri er ímóti, at lærugreinin kristni verður broytt til átrúnað. Hinvegin tekur biskupurin í Keypmannahavn, Erik Norman Svendsen, undir við tilmælinum hjá borgaraumboðanini. Hann sigur seg ikki duga at síggja nakað skeivt í at víðka lærugreinina, so hon eisini umfatar annan átrúnað.

## Heyerdahl veikur

Kendi norski ferða- og vísindamaðurin Thor Heyerdahl livir illa. Sonur hansara, Thor Heyerdahl yngri, segði í gjár, at pápi hansara er nú vorðin so veikur, at tað er bara ein spurningur um tímar, til hann kann fara hiðani.

Thor Heyerdahl, sum er 87 ára gamal, varð skorin fyri krabbamein í fjør, men sjúkan hevur breitt seg síðani. Sambært soninum hevur pápin sýtt fyri at fáa viðgerð av nøkrum slagi.